## Borað longsta holið

Felagið, sum veitir Reykjavíkar býi hita úr jørðini, hevur borað eitt 3.111 metrar langt hol niður í jørðina við Skarðsmýrarfjall fyri at útvega meiri jarðarhita. Hetta er longsta hol av sínum slagi, sum er borað í Íslandi. Holið er borað á skák og fer tí ikki so langt niður í jørðina sum eitt hol, ið varð borað í 1979, og sum fer 3.085 metrar niður. Hetta er størsta dýpið, sum borað er í í Íslandi, men ætlandi verður eitt nýtt met sett í heyst, skrivar Vísir.



## LAN-party í Eysturskúlanum

Saman við Føroya Tele skipar 9. flokkur í Eysturskúlanum í Havn fyri stórum teldutreffi um vikuskiftið. Hópin av teldum verða koplaðar saman umvegis LAN-netið á skúlanum, og so ber til at spæla og kappast móti hvørjum øðrum alt vikuskiftið. Byrjað verður klokkan 20 fríggjakvøldið, og spælt verður til sunnumorgunin. Eisini verður skipað fyri sølu av sodavatni, pizza og øðrum, sum hoyrir slíkum teldutreffi til.

# Hotellini standa gapandi tóm

**- Vetrarhálvuna liggja vit nærmast í dvala, men í ár er serliga ringt. Gistingarnar hjá okkum eru bara helvtin av tí, tær plaga at vera hesa ársins tíðina, sigur stjórin á Hotel Føroyum og Hotel Tórshavn, Jóhannes Jensen**



*Tað er óvanliga lítið at gera hjá hotellunum í fyrsta ársfjórðingi í ár, sigur Jóhannes Jensen, stjóri á Hotel Føroyum og Hotel Tórshavn*

GISTINGAR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er óvanliga friðarligt á Hotel Føroyum og Hotel Tórshavn. Kømurini standa í stóran mun órørd, og skilið í so máta er nógv verri, enn tað hevur verið tey mongu seinastu árini.

- Vit skulu heilt aftur til ár 2000 fyri at finna líknandi tøl av gistingum her hjá okkum, sigur Jóhannes Jensen, stjóri á Hotel Føroyum og Hotel Tórshavn.

Hann hevur ikki nakað beinleiðis boð um, hví tað er serliga ringt í ár, men hann heldur, at føroyingar í alt ov stóran mun kroysta øll tiltøk saman í juni, juli og august.

- Alt verður kroyst saman, serliga hesar tríggjar mánaðirnar. Umframt allar stevnurnar hava vit tónleikafestivalar í hópatali umframt onnur tiltøk. Føroyingar og útlendingar verða yvirfóðraðir hesa tíðina, meðan vit upp á tað nærmasta liggja í dvala um veturin, sigur Jóhannes Jensen.

Hann heldur, at føroyingar eru alt ov vánaligir at leggja tiltøkini til rættis.

- Tað tykist, sum hugburðurin er, at einki ber til í Føroyum um veturin. Ongar ráðstevnur eru vetrarhálvuna, og tað er ikki hugsingur um at skipa fyri uttandura tiltøkum hesa tíðina, sjálvt um vit føroyingar eitt nú skjóta harur í november og desember, sigur Jóhannes Jensen.

Vit føroyingar seta sostatt alt ov stórt fokus á, at einki ber til vetrarhálvuna, serstakliga ikki, tá tað kemur til uttandura virksemi.

- Um rætt varð atborið, varð okkurt av virkseminum flutt til vetrarhálvuna, samstundis sum onkrir nýggir aktivitetir vórðu skaptir, heldur stjórin á Hotel Føroyum og Hotel Tórshavn.

### Ótryggleiki

Men tað er sjálvandi bara ein partur av frágreiðingini, tí tað eru onnur viðurskifti, sum eisini gera seg galdandi.

- Tað er eingin loyna, at regulariteturin í flúgvingini ikki er hin besti. Og tað er ikki bara veðrið, sum hevur skuldina fyri tað, tí veðurlíkindini í Føroyum er ikki tað øðrvísi enn aðrastaðni. Tað eru flogvallarviðurskiftini sum heild, ið tað er galið við, sigur Jóhannes Jensen.

Ótryggleikin í tí at koma til og sleppa úr Føroyum ger, sambært Jóhannes Jensen, at fundir og aðrir aktivitetir verða lagdir í Keypmannahavn heldur enn í Tórshavn.

- Eg havi sjálvur ein dana í mínari nevnd, og tað er komið fyri fleiri ferðir, at vit hava verið noydd at útseta nevndarfundir, tí hesin danin ikki er sloppin til Føroya. Og sum eina avleiðing av hesum, hava vit valt at leggja okkara nevndarfundir í Keypmannahavn, har sum danski nevndarlimurin býr, sigur Jóhannes Jensen.

- Vit mugu jú minnast til, at tá tosað verður um regulariteit, so snýr tað seg ikki um, antin flogfarið lendir sama dag ella ikki. Tað er tann eini tímin ella tveir, sum flogfarið er seinkað, tað snýr seg um. Fólk, sum skulu til Føroya á fund, fara bara víðari, um flogfarið er seinkað hesar ein til tveir tímarnar, tí tá verður fundurin avlýstur kortini, vísir Jóhannes Jensen á.

Eitt annað, sum stjórin á hotellunum báðum fílist á, er, at tað er ógvuliga dýrt at flúgva til og úr Føroyum.

- Tað fer eingin aktiv marknaðarføring fram. Tað snýr seg bara um at flyta fólk frá A til B, og tá er talan um fólk, sum avgjørt noyðast til ella úr Føroyum, sigur Jóhannes Jensen.

### Nógv verri tøl

Stjórin á Hotel Føroyum og Hotel Tórshavn vil kortini ikki geva óregluligu flúgvingini ella flogvallarviðurskiftunum sum so skuldina fyri, at talið av gistingum er fallið so drastiskt.

- Eg haldi ikki árið í ár hevur verið so nógv øðrvísi enn undanfarin ár. Alt hevur verið sum tað plagar, metir Jóhannes Jensen.

Onkur hevur ført fram, at tunlarnir, sum komnir eru, eiga eina stóra skuld í færri gistingunum í ár, men her er Jóhannes Jensen ikki samdur.

- Hagtølini vísa, at føroyingar yvirhøvur gista ógvuliga lítið á hotelli. Tølini siga, at bara umleið 10% av gistingunum eru føroyingar. Landið er so lítið, at føroyingar yvirhøvur eru slopnir heim aftur sama dag, og sleppa teir ikki tað, gista teir hjá familju, sigur hann.

Í øðrum londum er tað í stóran mun landsins íbúgvarar, ið gista á hotellunum.

- Í Danmark er talið heili 61% av gistingunum, sum eru danskar. Í Týsklandi er talið 59% og í Fraklandi nakað tað sama. Eisini í einum lutfalsliga lítlum landi sum Íslandi, er ein stórur partur av gistingunum íslendskar, eini 40%, sigur Jóhannes Jensen.

Hann vísir víðari á, at kapasiteturin er ikki vaksin nakað, tí hóast Hotel Streym er komið aftrat við 14 kømurum, so er Sjómansheimið í Runavík afturlatið. Og meðan tað vóru tíggju vallaraheim fyri átta árum síðani, eru tey bert seks í dag. So í veruleikanum er samlaði kapasiteturin minkaður.

- Nú skal hetta ikki skiljast so, at støðan er katastrofal, men vit mugu bara staðfesta, at gistingarnar eru bert eina helvt av tí, tær hava verið tey nógvu seinastu árini. Men sjálvt um fyrsti ársfjórðingur er so vánaligur, so sær summarið ikki so galið út. Tað teknar til at fara at verða so, sum tað hevur verið seinastu árini, sigur Jóhannes Jensen, stjóri á Hotel Føroyum og Hotel Tórshavn.

Tað bar ikki til at fáa eina viðmerking frá Ásu Jónsdóttir, stjóra á Hotel Hafnia, sum er stødd uttanlands, men sum skilst er støðan har hin sama.